# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 09-03-2022

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um veiðu eftir botnfiski o.ø. við fiskiførum undir føroyskum flaggi í NAFO-skipanarøkinum í 2022**
(Hækking av toskakvotu)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 187 frá 22. desember 2021 um veiðu eftir botnfiski o.ø. við fiskiførum undir føroyskum flaggi í NAFO-skipanarøkinum í 2022 verður í § 3, stk. 1 eftir 1. pkt. sett:
"Harumframt kunnu fiskifør undir føroyskum flaggi í 2022 fiska 186 tons av toski í NAFO-deildarøki 3M, Flemish Cap, sum Føroyar hava sambært fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Bretland fyri 2022."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, xx mars 2022

**Árni Skaale**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert